# FRAMLEIÐSLUROKNSKAPUR 2022



# Slóðbrótandi tøkni tryggjar hægri úrtøku úr vindmegi

www.sev.fo



# Elfelagið SEV Framleiðsluroknskapur 2022

## Innihaldsyvirlit


Leiðsluátekning ....................................5
Átekning frá óheftum grannskoðara ...............6
Høvuðs- og lyklatøl ...............................8
Leiðslufrágreiðing.................................9
Nýttur roknskaparháttur ......................... 20
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember.... 25
Fíggjarstøða 31. desember........................ 26
Peningastreymsuppgerð........................... 28
Notur ........................................... 32





# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram framleiðsluroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 hjá Elfelagnum SEV. Framleiðsluroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá Elfelagnum SEV.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at framleiðsluroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2022 og av úrslitinum av framleiðsluvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 31. mars 2023

## Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

## Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

## Nevnd

*Kári Johansen*
*Formaður*

*Haraldur S. Hammer*
*Næstformaður*

*Niclas Hentze*

*Oddmar á Lakjuni*

*Poul Klementsen*

*Sonni L. Petersen*

*Sune Jacobsen*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**TIL LEIÐSLUNA Í ELFELAGNUM SEV**

Vit hava grannskoðað framleiðsluroknskapin, sum inniheldur upphæddir fyri rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreym og notur fyri Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2022. Upphæddirnar í framleiðsluroknskapinum eru partur av ársfrásøgnini fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2022, sum vit hava grannskoðað.

Tað er okkara fatan, at framleiðsluroknskapurin fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2022 á øllum týðandi økjum er gjørdur í samsvar við tær roknskaparreglur, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

**GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða framleiðslu-roknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**ÁHERÐSLA Á VIÐURSKIFTI Í FRAMLEIÐSLUROKNSKAPINUM – NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR**
Vit skulu gera vart við upplýsingarnar í innganginum av hesari váttan, harav tað framgongur, at framleiðsluroknskapurin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Hesi viðurskifti hava ikki ávirkan á okkara niðurstøðu.

**ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV FRAMLEIÐSLUROKNSKAPINUM**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera framleiðsluroknskapin samsvarandi teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at framleiðsluroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV AT GRANNSKOÐA FRAMLEIÐSLUROKNSKAPIN**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at framleiðsluroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í netroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í framleiðsluroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, hin 31. mars 2023

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
Statsaut. revisor

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 433.768 | 408.450 | 358.659 | 328.266 | 259.063 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 134.362 | 158.736 | 128.312 | 118.514 | 94.486 |
| Rakstrarúrslit | 25.030 | 54.459 | 36.027 | 49.344 | 20.265 |
| Fíggjarligir postar, netto | -14.705 | -19.903 | -18.434 | -16.476 | -9.340 |
| **Ársúrslit** | **9.673** | **34.960** | **17.969** | **32.718** | **10.650** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.898.199 | 1.714.619 | 1.755.214 | 1.696.153 | 1.565.760 |
| Eginogn | 890.940 | 870.798 | 838.307 | 817.531 | 789.767 |
| **Langfreistað skuld** | **818.725** | **827.932** | **724.439** | **733.250** | **437.369** |



# Leiðslufrágreiðing

**HØVUÐSVIRKSEMIÐ**
Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Sambært viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti til náttúru og umhvørvi.

Í loyvunum hjá SEV fyri einstøku framleiðslueindirnar framgongur, at í roknskapinum skal framganga, um framleiðslueindin hevur yvirskot ella undirskot. Hesin roknskapur fyri framleiðsluvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um framleiðsluvirksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2022 - 31. desember 2022.

**BÝTI AV AVLOP Í RAKSTRI**
Framleiðsluparturin skal hava allan sín rakstrarkostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til 5% av primoeginpeninginum. Roknaða kravið til vinningin í 2022 er 43,5 mió. kr. móti 40,5 mió. kr. í 2021.

Samlaða úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist 9,7 mió. kr. Orsøkin til, at úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist lægri enn roknaða kravið er, at ársúrslitið fyri netpartin verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur, umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Fyri útgreining av framferðarhátti og útrokning av býti millum framleiðslu- og netpartin, verður víst til notu 1.

**GONGDIN Í VIRKSEMINUM OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM**

**ÁRIÐ VAR EITT GOTT VINDORKUÁR OG FRAMÚR VATNORKUÁR**
Vit brúktu metnógvan streym í fjør, men yvir helmingurin av honum var úr varandi orkukeldum. Ongantíð fyrr er so nógv burðardygg elorka framleidd í Føroyum, og í Suðuroy var orkuframleiðslan 100% burðardygg í tilsamans smá 56 samdøgur.

Samlaða elframleiðslan í 2022 øktist 2,4% í mun til árið fyri, t.e. úr knøppum 424 GWt upp í 434 GWt. Góðir 226 GWt vóru framleiddir úr varandi orkukeldum, sum svarar til góð 52%. Hetta er mesta árliga elframleiðsla nakrantíð, og samstundis mesta úrtøka av varandi orku nakrantíð.

Varandi orkan í 2022 var býtt soleiðis: 130,9 GWt (30,1%) úr vatni, 90 GWt (20,8%) úr vindi, 5,4 GWt (1,3%) úr biogassi, og 0,171 GWt úr sólorku. SEV og dótturfeløgini stóðu fyri 89,9% av samlaðu framleiðsluni, meðan Vindrøkt stóð fyri 8,8%, og biogassverkið Førka framleiddi 1,4% av samlaðu elorkuni. Í tilsamans 50 samdøgur var orkuframleiðslan í meginøkinum yvir 80% grøn, meðan tølini í Suðuroy eru enn hægri.

Framleiðslan úr olju á Sundi minkaði í 2022. Í meginøkinum er Sundsverkið enn bulurin í framleiðsluni og framleiðir størsta partin av elorkuni. Í 2022 framleiddi Sundsverkið 186 GWt, ella 43% av samlaðu elframleiðsluni í meginøkinum. Umframt nógvu kilowatttímarnar, sum Sundsverkið stendur fyri, veitir verkið týðandi skipanarberandi tænastur, so sum tryggan eykamátt, rullandi eykamátt, reguleringskraft, inerti og kortslutningsmátt.

Sermerkt fyri 2022 var tó, at tað er fyrstu ferð síðan 2015, at framleiðslan á Sundi er í minking í mun til árið frammanundan. Framleiðslan á Sundi var 21% minni enn í 2021. Tað er serliga lutfalsliga stóra framleiðslan úr vatni, og økti vindorkumátturin, sum viðførdi lægri framleiðslu á Sundi.

**VATNORKAN GER MUNIN**
Framleiðslan úr vatni royndist sera væl í 2022 við 131 GWt, sum bleiv besta árið síðan metárið 2015, tá framleiddir vóru 133 GWt úr vatni. Felags fyri 2015 og 2022 er, at tað regnaði óvanliga nógv. Avfallsmátarin á Fitjunum í Vestmanna máldi 2.573 mm fyri árið 2022. Til samanberingar kom avfallið upp á góðar 1.904 mm í 2021. Í 2015 regnaði enn meira, og samlaða avfallið var góðar 2.680 mm.

Sermerkt fyri 2022 var, at nógva regnið fall í juli og august. Framleiðslan úr vatni gjørdist hesar báðar mánaðinar umleið tríggjar ferðir størri enn miðalframleiðslan fyri hesar mánaðirnar.

Verkini í Vestmanna, Fossá- Mýru- og Heygaverkið settu í 2022 met við tilsamans 57,4 GWt. Eiðisverkið er tó væl størsta einstaka vatnorkuverkið, og framleiddi í 2022 65 GWt, ella góð 16% av samlaðu framleiðsluni í meginøkinum.

**VINDORKAN ROYNDIST BETUR**

2022 var sermerkt við vindorku við tað, at bæði Sp/f Vindrøkt II og P/F Flatnahagi settu stórar vindmyllulundir upp og byrjaðu framleiðslu ávikavist á Gellingarkletti og í Flatnahaga oman fyri Tórshavn. Framleiðslan hjá Flatnahaga var tó bert royndarframleiðsla, sum ikki sæst aftur í samlaðu framleiðsluni. Myllurnar hjá Vindrøkt II fóru undir framleiðslu í juli, og náddu í 2022 eina framleiðslu á 28,2 GWt, svarandi til 7% av samlaðu framleiðsluni í meginøkinum.

Tað hilnaðist eisini betur hjá vindfeløgum hjá SEV í 2022 í mun til árið frammanundan. Í Húsahaga vóru framleiddir 31,8 GWt og í Neshaga var úrslitið 11,4 GWt; í báðum førum er talan um betri úrslit enn í 2021. Tað er serliga vindmyllulundin í Porkeri, sum legðist afturat í 2021 og framleiddi 12,3 GWt, sum ger munin. Trupulleikar eru enn við einstøkum vindmyllum í Neshaga og í Húsahaga, og arbeitt verður við at fáa hesar í rættlag.

Vindorkuframleiðslan í Vestmanna hjá Sp/f Vindrøkt hevði eina framleiðslu uppá 6,4 GWt, ein afturgongd á 8% í mun til 2021.

Ongantíð fyrr er so nógv varandi elorka framleidd í Føroyum, og tað er at fegnast um. Enn er tað vatnorkan, sum stendur fyri tí mesta, men útlit eru fyri væl meiri vindorku longu í 2023, við tað, at elnetið fer at kunna taka ímóti størri nøgd av vindorku frá myllunum á Gellingarkletti seinni í ár, og somuleiðis fer P/F Flatnahagi undir framleiðslu í Flatnahaga í 2023.

**VINDORKA Í SUÐUROY**

Vindmyllulundin hjá SEV í Porkeri hevur koyrt alt 2021 og 2022 og framleiddi í 2022 12,3 GWt móti 7,7 GWt í 2021. Orkubýtið í Suðuroynni er broytt munandi av hesum, og í 2022 vóru 47% móti í 31% av elnýtsluni í 2021 hjá suðringum framleidd við vatnorku, vindorku og sólorku.

**Talva 1**

**AVROKNAÐ SØLA Í GWT**

| | 2022 | 2021 | Broyting 22-21 GWt | Broyting 22-21 % |
|---|---|---|---|---|
| Avroknað søla til kundar í GWt | 395,3 | 387,6 | 7,7 | 2,0 |
| Nettap í GWt | 27,0 | 25,2 | 1,8 | 7,1 |
| Eginnýtsla í GWt | 11,8 | 11,0 | 0,7 | 6,7 |
| **Framleiðsla tilsamans í GWt** | **434,0** | **423,8** | **10,2** | **2,4** |
| Herav við termiskari | 207,4 | 262,4 | -55,0 | -21,0 |
| *% termisk* | *47,8* | *61,9* | | |
| Herav við vatni | 130,9 | 100,3 | 30,6 | 30,5 |
| *% vatn* | *30,1* | *23,7* | | |
| Herav við vindi | 90,2 | 54,1 | 36,1 | 66,7 |
| *% vindur* | 20,8 | 12,8 | | |
| Herav við BSS* | 5,6 | 7,0 | -1,4 | -20,0 |
| *% BSS* | *1,3* | *1,7* | | |
| **Grøn orka tilsamans** | **226,7** | **161,4** | **65,3** | **40,4** |
| ***% grøn orka*** | ***52,2*** | ***38,1*** | | |

* BSS = Biogass, sjóvarfall og sólorka

Tað, sum sermerkti 2022 í elveitingarhøpi, vóru nýbrotini í Suðuroy, har koblingsstøðin í Porkeri, við battaríum og synkronkompensatori varð tikin í nýtslu. Tíðliga á heysti sást týðulig broyting í framleiðslumynstrinum, og í seinasta árfjórðingi var framleiðslan úr varandi orku í Suðuroy heili 74%, býtt á 55% úr vindi og 19% úr vatni.

Vágsverkið, sum seinastu 5 árini hevur framleitt umleið 10 GWt úr olju seinasta ársfjórðing, framleiddi bert 2,9 GWt fjórða ársfjórðing í 2022. Ein stóran part av tíðini hevur verkið ligið stilt, meðan vindur, vatn, sól, battarí og synkronkompensator hava veitt suðringum streym. Í tilsamans 55,9 samdøgur hava suðringar havt 100% grøna orku í kontaktini, og í góð 83 samdøgur hevur orkan verið yvir 80% grøn.

**EFTIRSPURNINGURIN EFTIR ELORKU SETIR MET**

Vit brúka streym sum ongantíð fyrr. Vit settu aftur met í 2022 í samlaðu føroysku elframleiðsluni. Samlaða framleiðslan í 2022 var 434 GWt, samanborið við 424 GWt í 2021, svarandi til ein vøkstur á 2,4% móti 4,2% seinasta ár. Hetta er tað mesta sum SEV hevur framleitt nakrantíð.

Elframleiðslan úr varandi orkukeldum var 226,7 GWt í 2022 móti 161,4 GWt í 2021, svarandi til ein vøkstur uppá 65,2 GWt, ella 40,4%. Í 2022 stavaðu 90,2 GWt frá vindorkuni, og 130,9 GWt fingust burtur úr vatnorkuni. 207,4 GWt komu frá oljuriknu verkunum. Tað svarar til 47,8% av samlaðu elframleiðsuni í 2022 móti 61,9% í 2021.

*Mynd 1: Elframleiðslan fyri alt landið 1954 - 2022*




*Mynd 2: Leypandi 12-mánaða elframleiðsla 1988 - 2022 fyri alt SEV*




Seinastu góðu 20 árini er elframleiðslan tvífaldað. Í 2000 var framleiðslan 213 GWt, og í 2022 vórðu knappir 434 GWt framleiddir. Í 2010 var framleiðslan 280 GWt. Í meginøkinum vaks framleiðslan í 2022 2,3% móti 4,3% seinasta ár, og í Suðuroy vaks framleiðslan við 3,6% í ár móti 2,7% seinasta ár. Mesta lastin í meginøkinum var skrásett til 70,3 MW í 2022 móti 66,1 MW í 2021, meðan mesta lastin í Suðuroy er vaksin frá 8,7 MW í 2021 til 9,3 MW í 2022.

Elframleiðslan gjøgnum árini hevur verið sveiggjandi, sum víst á mynd 1 yvir elframleiðsluna fyri alt landið frá 1954 til 2022.

Á myndini sæst, at ein støðugur vøkstur hevur verið í elframleiðsluni síðani 1954 og fram til kreppuna í 90'unum, tá ið elframleiðslan byrjar at minka orsakað av fallandi nýtslu. Ikki fyrr enn í 1996 byrjar elframleiðslan aftur at vaksa, har hon í 2022 setur nýtt met við 434 GWt.

Eisini sæst, at framleiðslan av elmegi úr vatni økist munandi við endanum av 80-unum, orsakað av nýggja Eiðisverkinum, sum tá byrjaði framleiðslu av elmegi við vatni. Framleiðslan við vatni økist aftur í 2002 til 2007 orsakað av Eiði 3, fyri síðani at verða

*Mynd 3: Elframleiðslan pr. íbúgva í Føroyum 1970 - 2022*




*Mynd 4: Elframleiðslan býtt á økir 2022*




rættiliga støðug. Í 2010 og í 2011 eru høvuðsumvælingar gjørdar á turbinur og rør á Fossáverkinum og á Heygaverkinum, eins og turbina 1 á Eiðisverkinum er dagførd í 2012, meðan turbina 2 er dagførd í 2013. Hesar dagføringar síggjast aftur í framleiðsluni á myndini, tí hon fellur í 2010 og 2011. Hartil skal sigast, at í 2010 og 2013 regnaði sera lítið í mun til onnur ár. Í juni mánaði 2012 tók felagið nýggju turbinu 3 í nýtslu á Eiðisverkinum, sum saman við Eiði 2 suður økir framleiðsluna av elmegi við vatni við umleið 14 GWt árliga. Tunnilsverkætlanin varð liðug við ársenda 2013.

Í november mánaði 2012 var vindmyllulundin í Neshaga tikin í nýtslu, og 9. oktober 2014 var nýggja vindmyllulundin í Húsahaga tikin í nýtslu. Vindmyllulundin í Porkerishagnum byrjaði at framleiða inn á netið í november mánaða 2020 og formliga varð hon yvirtikin 11. februar 2021. Hon hevur framleitt inn á netið alt 2022. Eisini sæst at framleiðslan av vindi økist munandi í 2022, har vindmyllulundin hjá Vindrøkt II á Gellingarkletti byrjar at framleiða inn á netið í juli mánaði.

Mynd 2 vísir mánaðarligu elframleiðsluna frá 1988 til og við desember 2022. Sum sæst, minkar framleiðslan í 2011, meðan hon veksur støðugt teir 12 mánaðirnar í 2012 fyri aftur at falla og veksa eitt vet í 2013, vøksturin heldur fram í 2014 til 2022. Í 2022 var vøksturin 2,4%.

Mynd 3 vísir elframleiðsluna í Føroyum pr. íbúgva frá 1970 til 2022. Myndin vísir sama mynstur sum



*Mynd 5: Elframleiðslan á vatnorkuverkum í 2022*




mynd 1 og 2 av tí samlaðu elframleiðsluni fyri alt landið.

Felagið hevur framleiðsluverk kring landið, býtt upp á ymiskar framleiðslukeldur, so sum termisk, vatn, vind og sólorku. Harumframt kemur biogassverkið hjá Førka og vindmyllulundirnar hjá Vindrøkt II og Flatnahaga.

Mynd 4 vísir elframleiðsluna býtt eftir økjum í 2022. Sum myndin vísir, verður størsti parturin av elframleiðsluni framleiddur á Sundsverkinum, meðan næststørsti parturin verður framleiddur við vatni á Eiðisverkinum, sum í 2022 var 65 GWt. Framleiðslan úr vatni samlað er upp á 131 GWt, meðan framleiðslan á Sundsverkinum var 186 GWt.

Mynd 5 vísir framleiðsluna býtt eftir vatnorku-verkum í 2022. Á myndini sæst, at Eiði er størsti vatnorkuframleiðari, síðani kemur Fossáverkið í Vestmanna.

SEV hevur veitingarskyldu. Hetta merkir, at felagið altíð skal hava nóg mikið av tøkum mátti til tess at nøkta eftirspurninginum eftir ravmagni. Mynd 6 vísir mestu last og tøkan mátt fyri meginøkið frá 1957 til 2022.

Myndin vísir, hvussu nógvan tøkan mátt SEV hevur í mun til mestu elnýtslu. Orsøkin til, at SEV hevur so nógvan tøkan mátt, er tí at munandi partur av elframleiðsluni stavar frá óstøðugari orku. Tí er neyðugt at hava mátt tøkan.

Økingin í tøka máttinum í 2012 stavar frá nýggju turbinuni á Eiðisverkinum og vindmyllunum í Neshaga. Fallið í 2013 upp á 5,3 MW stavar frá niðurtøku av M3 á Sundsverkinum. Økingin í 2014 og 2015 stavar frá uppseting av tveimum nýggjum motorum á Sundsverkinum, fyri niðurtikna M3 motorin upp á 4,8 MW, umframt vindmyllunum í Húsahaga upp á 11,7 MW. Í 2016 var nýggi motorurin á Vágsverkinum tikin í nýtslu, og er hesin á 4,0 MW. Í 2017 og 2018 var ongin øking av tøkum mátti, men í 2019 keypti SEV tiltaksverk við einum samlaðum mátti upp á 8,0 MW.

Støð 3 á Sundsverkinum, sum bleiv formliga yvirtikin 31. mars 2020, tekur seg væl út, og tekniskt sæð er tað eitt elverk á høgum støði, sum veitir støðuga elorku til føroyska samfelagið. Sundsverkið merkir tað sama fyri føroyska samfelagið, sum kaðalsamanbindingin millum londini ger á meginøkinum. Útbygda Sundsverkið veitir eitt trygt grundarlag, meðan hildið verður fram við útbyggingum á grønu kósini til gagnnýtslu av varandi og burðardyggum orkukeldum.

Støð 3, sum nú er partur av Sundsverkinum, hýsir fýra nýggjum motorum við einum samlaðum motormátti á 37 MW. Saman við eldra partinum av Sundsverkinum – støð 1 og 2 á 45 MW – er mátturin á Sundverkinum tilsamans 82 MW. Til samanberingar kann nevnast, at eftirspurningurin eftir elorku í meginøkinum vanligar dagar liggur á 50-55 MW, og hægsti tørvur á elorku, sum nakrantíð er skrásettur, er 70,4 MW – tað var 8. desember 2022.

*Mynd 6: Mesta last fyri meginøkið og samlaður tøkur máttur 1957 - 2022*




Stórur dentur er lagdur á tryggleika og reinleika á støð 3; verkið hevur reinsiskipan, ið tekur skaðilig evni, NOx, úr roykinum og nógv er gjørt burturúr at dempa ljóðið frá motorunum. Eisini er nógv gjørt burturúr, at umstøðurnar til at reka og røkja verkið skulu vera góðar.

Á mynd 7 sæst døgnlastin mikudagin 5. oktober 2022 í meginøkinum. Myndin vísir døgnlastina ein vanligan dag í 2022. Myndin vísir, at lastin er rættiliga jøvn frá kl. 9 á morgni til kl. 20 á kvøldi. Nógvu seinastu árini hevur døgnlastmyndin stórt sæð verið óbroytt.

Fyri at nøkta eftirspurninginum eftir elmegi, hevur SEV eina fjølbroytta maskinpark, sum umfatar motorar, vatnturbinur og vindmyllur. Harafturat er sólorkuanlegg sett upp í Sumba sum ein partur av eini granskingarætlan, og sjóvarfallsturbinur eru settar niður í Vestmannasundi, eisini sum ein partur av eini granskingarætlan.

**SAMLAÐAR INNTØKUR**
Samlaðu inntøkurnar fyri framleiðslupartin í 2022 vóru 433,8 mió. kr. móti 408,4 mió. kr. í 2021. Av hesum inntøkunum framleiddi Sundsverkið fyri 297,5 mió. kr. í 2022 og 283,3 mió. kr. í 2021, ella ávikavist 68,6% og 69,4%. Vágsverkið framleiddi fyri 49,4 mió.kr í 2022 og 43,1 mió. kr. í 2021, ella ávikavist 11,4 % og 10,5%.

Hetta svarar til, at tey bæði størstu oljuriknu framleiðsluverkini framleiða fyri eina inntøku upp á 346,9 mió. kr. í 2022 móti 326,4 mió. kr. í 2021, svarandi til ávikavist 80,0% og 79,9% av samlaðu inntøkunum hjá framleiðslupartinum. Rakstrarúrslitið fyri framleiðslupartin í 2022 gav eitt yvirskot upp á 9,7 mió. kr. móti 35,0 mió. kr. í 2021.

**SAMLAÐAR ÚTREIÐSLUR**
Samlaðu útreiðslurnar í 2022 vóru 424,1 mió. kr. móti 373,5 mió. kr. í 2021. Talan er um útreiðslur til olju, rakstrarútreiðslur, avskrivingar, fíggjarkostnað og skatt. Rakstrarútreiðslurnar verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk, og tilfar og tænastuveitingar. Fyri framleiðsluverkini eru oljuútreiðslurnar ein sera stórur partur av samlaðu útreiðslunum. Í 2022 vóru oljuútreiðslurnar 224,3 mió. kr. móti 183,7 mió. kr., sum er 52,9% av samlaðu útreiðslunum í 2022 móti 49,2% í 2021.

**OLJUÚTREIÐSLUR**
Við støði í tí strategi, felagið hevur at halda løgdu fíggjarætlanina, hevur felagið prístryggjað (hedgað) tungoljukeypið fyri 2022. Ein nærri lýsing av langtíðarætlanini fyri at avdekka váða er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

**Talva 2**
**OLJUNÝTSLA Í TONSUM**

| | 2022 | 2021 | Broyting tons | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Tungolja | 41.992 | 51.436 | -9.444 | -18,4 |
| Gassolja | 1.596 | 2.593 | -997 | -38,5 |
| **Tilsamans** | **43.588** | **54.030** | **-10.442** | **-19,3** |



**Talva 3**
**OLJUKOSTNAÐUR Í MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 | Broyting mió. kr. | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Tungolja | 192,7 | 155,3 | 37,5 | 24,1 |
| Gassolja | 17,2 | 17,0 | 0,2 | 1,2 |
| Smyrjiolja, urea | 14,4 | 11,4 | 3,0 | 26,1 |
| **Tilsamans** | **224,3** | **183,7** | **40,7** | **22,1** |

Oljuprísirnir, sum SEV skal gjalda, eru tengdir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum.

Av talvu 3 framgongur, at talan er um ein meirkostnað í mun til undanfarna ár upp á 40,7 mió. kr. Í 2022 hevur SEV brúkt 9.444 tons minni av tungolju, men meirkostnaðurin av tungoljuni er 37,5 mió. kr. í mun til undanfarna ár. Nýtslan av gassoljuni er fallin í mun til undanfarna ár við 997 tonsum, men kostnaðurin av gassoljuni er øktur við 0,2 mió. kr. Eisini brúkti felagið smyrjuolju og urea fyri 14,4 mió. kr., sum er 3,0 mió. kr. meiri enn undanfarna ár.

Miðalnýtslukostnaðurin fyri hvørt tons tungolju var 4.590 kr. í 2022 móti 3.018 kr. pr tons í 2021. Talan er sostatt um ein meirkostnað í 2022 upp á 1.572 kr. pr. tons í mun til 2021. Orsøkin er øktur oljuprísur, hækkandi flutningskostnaður og javning av oljugoymslu.

Miðalnýtslukostnaðurin fyri hvønn litur gassolju var í 2022 10,79 kr. móti 6,56 kr. í 2021. Hann var sostatt 4,23 kr. hægri enn í 2021. Orsøkirnar eru, at flutningskostnaðurin við skipi og tyrlu til smærri verkini á útoyggj er íroknaður gassoljukostnaðin, og innkeypsprísin fyri gassolju, er farin munandi upp í 2022.

Oljuútreiðslurnar svara til 52,9% av kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2022 hjá framleiðslupartinum. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, hvussu gongdin í oljuprísinum og kursurin á dollaranum er.

Mynd 8 vísir eitt yvirlit yvir oljunýtsluna í sambandi við framleiðsluna av el frá 1990–2022 býtt út á gassolju og tungolju.

**TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR**
Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til framleiðsluvirkir í 2022 vóru 36,5 mió. kr. móti 29,3 mió. kr. í 2021, svarandi til eina hægri nýtslu upp á 7,2 mió. kr.

Kostnaðurin til tilfar og tænastuveitingar á Sundsverkinum í 2022 vóru 18,9 mió. kr. móti 13,8 mió. kr. í 2021, ella 51,7% av samlaða kostnaðinum fyri tilfar og tænastuveitingar í 2022. Av samlaða kostnaðinum átti Vágsverkið 3,6 mió. kr. í 2022 móti 2,7 mió. kr. í 2021. Hetta svarar til 9,7% av samlaða kostnaðinum.

Fyri fleiri sundurgreiningar av kostnaðinum fyri seinastu árini, verður víst til samtaksroknskapin, sum sæst á www.sev.fo.

**STÝRING AV ELSKIPANINI OG SKIPANARBERANDI TÆNASTUR**
Í samlaðu útreiðslunum hjá verkunum er íroknað kostnaðurin av at framleiða elmegi, kostnaðurin fyri stýring av elskipanini, og kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur.

Kostnaðurin tilsamans kann sundurgreinast í kostnaðin fyri tilrættislegging og stýring av tøka máttinum, rullandi máttinum, reaktiva máttinum, spenningsregulering og frekvensregulering. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið, umframt kostnaðin fyri tí partinum av skipanarberandi tænastum, sum verkini standa fyri.

Felagið arbeiðir í løtuni við at endurskoða kostnaðirnar fyri stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur. Ávegis úrslit benda á, at hesir kostnaðir eru hægri enn kostnaðirnir, sum eru innroknaðir í roknskapinum, og felagið fer frá 2023 at innrokna hesar kostnaðir eftir nýggjum leisti.

**KOSTNAÐUR FYRI STÝRING AV ELSKIPANINI**
Stýringin av elskipanini í Suðuroynni fer fram í kontrollrúminum á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elskipanini í meginøkinum fer fram í Kontrollrúminum fyri meginøkið.

Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini á meginøkinum upp á 8,4 mió. kr., er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri tilfar, lønir og avskrivingar

*Mynd 7: Døgnlastin mikudagin 5. oktober 2022 í meginøkinum*




*Mynd 8: Oljunýtslan í tonsum 1990-2022*




á Kontrollrúminum fyri meginøkið. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy er 2,3 mió. kr.

**KOSTNAÐUR FYRI SKIPANARBERANDI TÆNASTUR**

Í samstarvi við ráðgevingarfyritøkuna Deloitte í Danmark hevur SEV gjørt kostnaðin upp fyri skipanarberandi tænastur í apríl 2021. Analysugrundarlagið eru tøl frá 2019 og 2020. Niðurstøðan er, at talan er um ein kostnað fyri skipanarberandi tænasturnar uppá 0,26 kr. pr. seldan kWt. Hesin kostnaður vil broytast so hvørt sum kostnaður og seldir kWt broytast, men SEV hevur valt at taka støði í kostnaðinum fyri skipanarberandi tænastur uppgjørdir pr. apríl 2021.

Undanfarin ár hevur kostnaðurin fyri skipanarberandi tænasturnar verið gjørdur upp til at vera 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum av Sunds- og Vágsverkinum. Um hildið varð fast í gamla háttinum at gera kostnaðin fyri skipanarberandi tænasturnar upp uppá, so vildi kostnaðurin fyri 2022 verið ávikavist 14,2 og 4,8 mió. kr. ella íalt 19,0 mió. kr. Talan var um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Íkastið til kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars var grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Fyri 2022 vildi verið talan um ein kostnað uppá 6,7 mió.kr., um hesin bleiv uppgjørdur eftir leistinum árini frammanundan. Smáverkini fingu rakstrarkostnaðin



**Talva 4**
**AVSKRIVINGAR, MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 | Broyting mió. kr. | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Sundsverkið | 51,4 | 51,4 | 0,0 | 0,0 |
| Vágsverkið | 10,0 | 9,5 | 0,6 | 5,9 |
| Fossáverkið | 3,5 | 3,4 | 0,1 | 2,1 |
| Heygaverkið | 1,2 | 1,0 | 0,2 | 20,3 |
| Mýruverkið | 1,5 | 1,6 | -0,2 | -9,6 |
| Eiðisverkið | 20,0 | 20,0 | 0,0 | 0,2 |
| Verkið í Botni | 0,8 | 0,8 | 0,0 | -0,2 |
| Verkið á Strond | 2,1 | 2,0 | 0,1 | 5,9 |
| Vindorka | 16,1 | 13,9 | 2,2 | 16,1 |
| Smáverk | 2,7 | 0,8 | 2,0 | 263,3 |
| **Tilsamans** | **109,3** | **104,3** | **5,1** | **4,8** |

**Talva 5**
**ÍLØGUR EFTIR DEILD, MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 | Broyting mió. kr. | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Sundsverkið | 26,7 | 28,1 | -1,4 | -4,8 |
| Vágsverkið | 4,9 | 3,8 | 1,1 | 29,4 |
| Fossáverkið | 1,2 | 0,4 | 0,7 | 164,6 |
| Heygaverkið | 0,8 | 0,1 | 0,7 | 565,2 |
| Mýruverkið | 0,2 | 0,4 | -0,2 | -58,8 |
| Mýruverkið II | 22,6 | 20,4 | 2,2 | 10,7 |
| Eiðisverkið | 1,1 | 1,0 | 0,1 | 12,2 |
| Verkið í Botni | 1,6 | 3,7 | -2,1 | -55,8 |
| Verkið á Strond | 1,6 | 1,8 | -0,3 | -14,2 |
| Vindorka | 2,9 | 0,1 | 2,8 | 3034,4 |
| Smáverk | 5,6 | 4,2 | 1,4 | 32,7 |
| **Tilsamans** | **69,2** | **64,1** | **5,1** | **8,0** |

**Talva 6**
**STØRSTU ÍLØGURNAR 2022, MIÓ. KR.**

| | 2022 |
|---|---|
| Mýruverkið II, pumpuskipan Vestmanna | 22,6 |
| Sundsverkið, M5 nýggjar turboløðarar | 4,6 |
| Sundsverkið, havarí á M6 | 2,9 |
| Sundsverkið, ketil | 2,8 |
| Mykines, dagføring av verkinum | 2,3 |
| **Tilsamans** | **35,3** |

fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin av kostnaðinum var endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu. Elverkið á Strond fekk rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi umfataða sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum var endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu.

**SAMLAÐUR KOSTNAÐUR FYRI STÝRING AV ELSKIPANINI OG SKIPANARBERANDI TÆNASTUR**

Samlaður kostnaður fyri stýring av elskipanini í Føroyum er 10,7 mió. kr. meðan kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur á termisku og vatnorku-verkunum er 87,8 mió. kr. Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur frá øðrum verkum er 6,7 mió. kr. Samlaði kostnaðurin fyri stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur er 105,2 mió. kr. í 2022, og í 2021 var kostnaðurin 107,7 mió. kr.

**LØNARÚTREIÐSLUR**

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið vóru 38,6 mió. kr. í 2022 móti 36,8 mió. kr. í 2021, svarandi til ein hækkan á 1,8 mió. kr.

Av samlaða lønarkostnaðinum í 2022 eigur Sundsverkið 26,0 mió. kr. móti 22,8 mió. kr., ella ávikavíst 67,5% og 62,0%. Vágsverkið eigur í 2022 6,7 mió. kr. og fyri 2021 6,1 mió. kr. í lønarkostnaði, svarandi til ávikavíst 17,2% og 16,6% . At lønarútreiðslurnar til Vágsverkið eru á einum hægri støði enn framleiðslan tilskilar, er grundað á stýringina av elskipanini í Suðuroy. Hendan kostnað fær Vágsverkið endurrindaðan frá netpartinum, sum frammanfyri greitt frá.

Samanumtikið kann sigast, at størsti parturin av lønarútreiðslunum fara til oljuriknu verkini. Vatn- og vindorkuverkini hava bert 4,0 mió. kr., ella 10,5% av samlaða lønarkostnaðinum.

**FÍGGJARKOSTNAÐUR**

Rentuútreiðslurnar vóru 14,7 mió. kr. í 2022 móti 19,9 mió. kr. í 2021.

**AVSKRIVINGAR**

Avskrivingarnar fyri 2022 vóru 109,3 mió. kr. móti 104,4 mió. kr. í 2021, sum er 4,9 mió. kr. hægri.

Størsti parturin av avskrivingunum í 2022 er at finna á Sundsverkinum, sum verður avskrivað við 51 mió. kr. meðan hækkingin í størstan mun kemur frá tilgongdunum til avskrivingargrundarlagið í 2022 viðvíkjandi stormskaðanum í februar 2020 á Sundsverkinum, lendistrygging á Sundsverkinum, tangahúsumlegging og køliskipan, eins og vegurin til Botn er asfalteraður.

**ÍLØGUR**
Íløgurnar í materiellari støðisogn vóru 69,2 mió. kr. í 2022 móti 64,1 mió. kr. í 2021, sum talva 5 vísir.

Størstu íløgurnar á framleiðslusíðuni eru vístar í talvu 6.

Talvurnar 7 til 9 vísa gongdini í íløgum, arbeiði í gerð og tilgongd til støðisogn.

Tilgongd frá arbeiði í gerð og beinleiðis bókað til støðisogn (avskrivingargrundarlag) var 48,6 mió. kr. í 2022 og 95,4 mió. kr í 2021. Víst verður eisini til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

Størstu íløgurnar hjá framleiðslupartinum, sum eru fluttar til tilgongd, eru vístar í talvu 10.

Víst verður eisini til nærri umrøðu um íløgurnar í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

**GJALDFØRIÐ**
Gjaldførið er ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, og hava millumrokningar millum partarnar verið nýttar. Í hesum roknskapi er gjaldførið hjá framleiðsluverkunum ásett til 0 mió. kr., men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri. Sama er galdandi fyri vindfeløgini, sum eisini verða fíggjað av netpartinum.

Tøkur peningur felagsins við ársenda er 367,3 mió. kr. móti 144,2 mió. kr. í 2021. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 850,0 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 1.217,3 mió. kr. móti 564,2 mió. kr. í 2021. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini. Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

**Talva 7**
**ÍLØGUR, MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 66,8 | 60,7 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 2,3 | 3,4 |
| **Íløgur við ársenda** | **69,2** | **64,1** |

**Talva 8**
**ARBEIÐI Í GERÐ, MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 77,8 | 109,2 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 66,8 | 60,7 |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -46,3 | -92,0 |
| **Salda við ársenda** | **98,4** | **77,8** |
| Broyting í arbeiði í gerð | 20,6 | -31,3 |

**Talva 9**
**TILGONGD TIL STØÐISOGN, MIÓ. KR.**

| | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd | 46,3 | 92,0 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn | 2,3 | 3,4 |
| **Tilgongd við ársenda** | **48,6** | **95,4** |

**Talva 10**
**STØRSTU TILGONGDIRNAR TIL AVSKRIVING**

| | 2022 |
|---|---|
| Sundsverkið, stormskaði februar 2020 | 16,4 |
| Sundsverkið, lendistrygging | 3,8 |
| Asfaltering vegur til Botn | 2,8 |
| Sundsverkið, tangahús umlegging | 2,5 |
| Sundsverkið, retur kølivatn | 1,9 |
| **Tilsamans** | **27,5** |



Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at SEV altíð er ført fyri at rinda kontant fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum, ella á netinum. Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin hjá framleiðsluverkunum og á netpartinum. Nærri lýsing av gjaldførinum er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

**VÁÐAVIÐURSKIFTI**
Nærri lýsing av váðaviðurskiftunum er í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

**ÚTLIT FYRI RAKSTRARÁRIÐ 2023**
Úrslitið áðrenn skatt fyri 2023 er eitt ætlað yvirskot umleið 30 mió. kr. við støði í fyriliggjandi ætlan fyri 2023 og eftir meting av býtinum av úrslitinum í mun til eginpeningskravið. Leiðsla felagsins er nøgd við ætlaða úrslitið fyri 2023 og við fíggjarligu støðuna og búskaparligu útlitini hjá felagnum.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 72,2 mió. kr. í 2023 móti 75,1 mió. kr. í 2022, svarandi til eina lægri útreiðslu upp á 2,9 mió. kr.

Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlanini fyri 2023 mettar at verða 180,6 mió. kr. móti 224,3 mió. kr. í 2022, sum eru 43,7 mió. kr. lægri. Felagið hevur sum eina langtíðarætlan at prístryggja oljukeypið fyri árið í mesta lagi á hædd við tað sama sum í fíggjarætlanini. Felagið hevur prístryggjað oljukeypið fyri árið 2023 við avtalum undanfarin ár. Harumframt hevur felagið tikið hædd fyri javnan av oljugoymslum til marknaðarvirði, sum fyri 2023 er innroknað í fíggjarætlanini.

Ótryggu viðurskiftini á oljumarknaðinum nú kríggj er millum Russland og Ukraina hevur ávirkan á oljukostnaðin. Hóast tungoljukeypið í 2023 er prístryggjað, kann hugsast, at hækkandi ella høgi oljuprísurin kann ávirka samlaða oljukostnaðin og harvið úrslitið skeivan vegin.

Avskrivingarnar verða 107,5 mió. kr. í 2023 móti 109,3 mió. kr. í 2022. Rentuútreiðslurnar væntast at vaksa við økingini í skuldini, sum fer til at fíggja íløgurnar. Rentuútreiðslurnar væntast at verða hægri í 2023 enn í 2022. Fyri árið 2023 verður mett at rentuútreiðslurnar verða 34,9 mió. kr. Í 2022 bleiv hesin kostnaður 14,7 mió. kr., sum er ávirkaður av javnan av fíggjarligum amboðum.

Við einum mettum yvirskoti í 2023, luttekur raksturin fyri framleiðslupartin við einari eginfígging til íløgur. Tað er neyðugt at hava eina nøktandi eginfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í verandi framleiðsluverk og íløgur í varandi orkukeldur.

Nærri lýsing av 2023 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2023 á www.sev.fo.

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Elfelagið SEV er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur upp sum ein samtaksroknskapur, uttan útjavnan av innanhýsis bókingum í rakstri og javna. Hetta fyri at geva lesaranum so góða kunning sum gjørligt um alt framleiðsluvirksemi hjá SEV-samtakinum. Annars er ársroknskapurin gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

**ALMENT UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somu-leiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA**
Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir millum handilsdagin og gjaldsdagin verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

**RAKSTRARROKNSKAPURIN**

**NETTOSØLA**
Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

**VØRUNÝTSLA**
Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

**AÐRIR UTTANHÝSIS KOSTNAÐIR**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

**SKIPANARBERANDI TÆNASTUR**
Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi, umframt kostnaðin fyri veitan av skipanarberandi tænastum. Skipanarberandi tænastur umfata tilrættislegging og stýring av tøkum mátti, rullandi mátti, reaktivum mátti, spenningsregulering og frekvensregulering.

Íkastið til kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkunum.

**STÝRING AV ELSKIPANINI**
Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri tilfar, lønir og avskrivingar á Kontrollrúminum við Landavegin í Tórshavn. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy verður gjørdur upp grundað á lønirnar á Vágsverkinum.

**BÝTI AV INNTØKUM**
Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. SEV hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2020 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5-ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur umframt eina eginfígging í løtuni upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

**STARVSFÓLKAKOSTNAÐIR**
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**AV- OG NIÐURSKRIVINGAR**
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

**FÍGGJARPOSTAR**
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Órealiseraður rentukostnaður í samband við prístrygging.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýti verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## FÍGGJARSTØÐAN

### MATERIELL STØÐISOGN

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganar-virði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskriv-ingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 10-50 ár | 0 % |
| Bygningar | 50 ár | 0 % |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

### NIÐURSKRIVING AV STØÐISOGN

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

### FÍGGJARLIG STØÐISOGN

### KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FELØGUM

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

### VØRUGOYMSLUR

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

### ÁOGN

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### TÍÐARAVMARKINGAR

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

### TØKUR PENINGUR

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, ið hava eina lánitíð undir 3 mánaðir, og sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

### PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

### AÐRAR AVSETTAR SKYLDUR

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

### AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ

Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað ogn ella skuld. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir, og sum stuttfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

### GJALDFØRISTRYGGING

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

### SKULD

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina

og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

**PENINGASTREYMSUPPGERÐ**

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postunum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittir.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.



# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

**Upphæddir í t.DKK**

| Nota | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettosøla | 433.768 | 408.450 |
| 2 | Oljuútreiðslur | -224.327 | -183.669 |
| 3 | Tilfar og tænastuveitingar | -36.490 | -29.275 |
| | **Bruttovinningur** | **172.951** | **195.505** |
| | | | |
| 4 | Starvsfólkaútreiðslur | -38.590 | -36.769 |
| | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -109.331 | -104.278 |
| | **Rakstrarúrslit** | **25.030** | **54.459** |
| | | | |
| 5 | Fíggjarútreiðslur | -14.705 | -19.903 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **10.325** | **34.555** |
| | | | |
| 6 | Skattur av ársúrsliti | -652 | 405 |
| | **Ársúrslit** | **9.673** | **34.960** |
| | | | |
| | Uppskot til býti av ársúrsliti: | | |
| | Flutt úrslit | 9.673 | 34.960 |
| | **Býti tilsamans** | **9.673** | **34.960** |

# Fíggjarstøða 31. desember

OGN í t.DKK

| Nota | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 7, 14 | Framleiðsluvirkir | 1.540.641 | 1.601.749 |
| | Bygningar og jarðarøkir | 4.264 | 4.401 |
| | Rakstrargøgn | 2.292 | 1.328 |
| | Íløguarbeiði í gerð | 98.421 | 77.842 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **1.645.619** | **1.685.320** |
| | | | |
| | Avleidd fíggjarlig amboð | 10.918 | 450 |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsaman** | **10.918** | **450** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **1.656.537** | **1.685.770** |
| | | | |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Oljugoymsla | 29.426 | 23.389 |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **29.426** | **23.389** |
| | | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 0 | 1.052 |
| | Millumrokning net | 210.005 | 0 |
| 6 | Skattaáogn | 1.705 | 1.686 |
| | Tíðaravmarkingar | 525 | 2.722 |
| | **Áogn tilsamans** | **212.236** | **5.460** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **241.662** | **28.849** |
| | **Ogn tilsamans** | **1.898.199** | **1.714.619** |



# Fíggjarstøða 31. desember

SKYLDUR í t.DKK

| Nota | | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 8 | Partapeningur í dótturfeløgum | 0 | 0 |
| | Grunnur til avleidd fíggjarlig amboð | 10.918 | 450 |
| | Flutt úrslit | 851.021 | 841.349 |
| | **Eginogn tilsamans** | **861.940** | **841.798** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 6 | Útsettur skattur | 1.585 | 914 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **1.585** | **914** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 9 | Langfreistað skuld | 818.725 | 827.932 |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **818.725** | **827.932** |
| | | | |
| 9 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 170.340 | 9.007 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 35.524 | 19.632 |
| | Millumrokning net | 0 | 5.774 |
| | Onnur skuld | 10.084 | 9.561 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **215.949** | **43.975** |
| | **Skuld tilsamans** | **1.034.674** | **871.907** |
| | **Skyldur tilsamans** | **1.898.199** | **1.714.619** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **10** | **Framleiðsluúrslit á virkir** | | |
| **11** | **Maskinyvirlit** | | |
| **12** | **Veðsetingar og aðrar skyldur** | | |

# Peningastreymsuppgerð

| Nota | Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| | **Ársúrslit** | **9.673** | **34.960** |
| 13 | Reguleringar | 124.689 | 123.776 |
| | | | |
| | **Broyting í rakstrarpeningi:** | | |
| | Vørugoymslur | -6.037 | -3.344 |
| | Áogn | 3.198 | 423 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 15.892 | 19.632 |
| | Millumrokning net | -215.780 | -193.314 |
| | Onnur rakstrarskuld | 573 | -1.868 |
| | **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | **-67.792** | **-19.734** |
| | Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | -14.705 | -19.903 |
| | **Peningastreymar frá rakstrinum** | **-82.497** | **-39.637** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -49.050 | -95.371 |
| | Broyting arbeiði í gerð | -20.579 | 31.319 |
| | **Peningastreymar frá íløgum** | **-69.629** | **-64.052** |
| | Avdráttir upp á langfreistaða skuld | 152.126 | 103.689 |
| | **Peningastreymar frá fígging** | **152.126** | **103.689** |
| | **Samlaðir peningastreymar í árinum** | **0** | **0** |
| | Tøkur peningur við ársbyrjan | 0 | 0 |
| | **Tøkur peningur við árslok** | **0** | **0** |





## Framleiðsluroknskapur 2022

# Notur



# Nota 1

1. NETTOUMSETNINGUR

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Eginframleiðsla | 350.472 | 316.145 |
| Eginnýtsla streymur | -12.779 | -8.795 |
| Netumsiting | 2.300 | 2.300 |
| Skipanarberandi tænastur | 94.462 | 98.958 |
| Onnur søla | -687 | -159 |
| **Tilsamans** | **433.768** | **408.450** |

**BÝTI AV AVLOP Í RAKSTRI**

Í 2011 fór SEV undir at gera sjálvstøðugar roknskapir fyri framleiðslu- og netpartarnar. Í hesum sambandi hevur felagið tikið hædd fyri at rokna vinning í framleiðslupartinum á sama hátt, sum kravt er í sambandi við vindorkuútboðini. Innrokningin av vinningi er fyri at geva eina rættvísandi mynd av rakstrinum hjá framleiðslupartinum, sæð í mun til avkastkrav og virðisrøkt av ognunum hjá framleiðslupartinum.

Fyri framleiðslupartin merkir hetta, at hesin skal hava allan sín kostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til umleið 5% av primoeginpeninginum.

Roknaða kravið til vinningin í 2022 er 43,5 mió. kr. móti 40,5 mió. kr. í 2021, svarandi til 5,0% av primoeginpeninginum hjá framleiðslu-partinum. 5% í vinningi metur SEV er eitt rímiligt avkast í løtuni í mun til inflatión og aðrar íløgumøguleikar. Samlaða úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist 9,7 mió. kr.

Sambært Elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støðið í kravinum til eginfígging. Í sambandi við, at íløgurnar stavandi frá visión 2030 verða gjørdar fyrr enn áður ætlað, kann tað gerast neyðugt at hækka kravið upp á 25% eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggjast við lántøku. SEV hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2022 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støðið í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart. So hvørt sum hesin lækkar, verður neyðugt at hækka kravið til eginfígging, frá 25% til 42,5%, sum er innanhýsis eginpeningskravið til eginpeningspartin. Kravið til eginpeningspartin sambært lániavtalum felagsins er 35% (fyrr 37,5%).

Markið skal síggjast í mun til íløgurnar á fíggjarætlanini fyri eitt rullandi 5 ára tíðarskeið. Í fíggjarætlanini fyri 2022 sæst, at íløgurnar fyri 2022-2026 í framleiðslupartinum eru 1.426 mió. kr. Hetta svarar til 285 mió. kr. árliga í miðal. Eginfíggingarparturin fyri 2022 er soleiðis ætlaður til 71 mió. kr.

Fyri netpartin er talan um íløgur fyri 670 mió. kr., og er eginfíggingarparturin samsvarandi ætlaður til 34 mió. kr. fyri 2022. Tað er umráðandi, at eginfíggingin er á einum nøktandi støði, og hetta kann bert gerast við avlopi á rakstrinum.

Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstri minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið upp á 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur, umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin.

Býti av yvirskotinum millum framleiðslupartin og netpartin árini frammanundan hevur tikið støðið í, at tilluta framleiðslupartinum eitt úrslit svarandi til, at allur kostnaður er rindaður, íroknað kostnað fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt 5% vinning av primoeginpeninginum.

Frameftir verður neyðugt at økja inntøkurnar hjá framleiðslupartinum í mun til netpartin soleiðis, at hesar samsvara við øktu skuldarbyrðuna hjá framleiðslupartinum, sum væntandi kemur av útbyggingum av framleiðsluverkum.

Um samlaða úrslitið fyri samtakið var størri, var hesin parturin av úrslitinum fluttur til netpartin. Hetta er broytt í 2016 við, at tað nú er netparturin, sum hevur eitt tillagað úrslit og ikki framleiðsluparturin.



# Notur 2-5

2. OLJUÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Gassolja | 17.216 | 17.011 |
| Tungolja | 192.727 | 155.255 |
| Smyrjiolja, urea | 14.384 | 11.403 |
| **Tilsamans** | **224.327** | **183.669** |

3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Byrgingar, rør og tunlar | 109 | 167 |
| Tangar og umhvørvi | 442 | 569 |
| Maskinur | 13.607 | 12.214 |
| El og tøkni | 303 | 766 |
| Bygningar og lendi | 1.504 | 1.645 |
| Aðalfundur og nevnd * | 622 | 65 |
| Kanning og ráðgeving | 2.346 | 1.292 |
| Kunningartøkni * | 3.720 | 1.305 |
| Leiðsla og skrivstovuhald * | 1.590 | 391 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 2.785 | 722 |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 9.463 | 10.139 |
| **Tilsamans** | **36.490** | **29.275** |

* Útreiðslur til hesar bólkar eru flokkaðar øðrvísi í 2022 í mun til 2021, og beinleiðis samanburður er tí ikki møguligur millum árini

4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Lønir | 33.714 | 32.238 |
| Pensjónir | 3.314 | 3.154 |
| Almenn gjøld | 1.561 | 1.376 |
| **Tilsamans** | **38.590** | **36.769** |
| | | |
| **Ársverk** | **68** | **60** |

5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld | 14.705 | 19.903 |
| **Tilsamans** | **14.705** | **19.903** |

# Notur 6-7

## 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Skattur í árinum sambært rakstrarroknskapi | -652 | 405 |
| | | |
| Skattaáogn P/F Vindfelagið í Húsahaga 01.01 | 1.686 | 249 |
| Javning skattáogn primo | 0 | 1.113 |
| Broyting í skattaáogn í árinum sambært rakstrarroknskapi | 19 | 325 |
| **Skattaáogn P/F Vindfelagið í Húsahaga 31.12** | **1.705** | **1.686** |
| | | |
| Avsett til útsettan skatt P/F Vindfelagið í Neshaga 01.01 | -914 | -994 |
| Broyting í útsettum skatti í árinum sambært rakstrarroknskapi | -671 | 80 |
| **Avsett til útsettan skatt P/F Vindfelagið í Neshaga 31.12** | **-1.585** | **-914** |

## 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphæddir í t. DKK | Framleiðsla | Býtisvirkir | Bygningar | Rakstrargøgn | Tils. 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 2.952.954 | 36 | 5.275 | 7.343 | 2.965.608 | 2.895.420 |
| Javning útveganarvirði | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -21.112 |
| Tilgongd í árinum | 47.503 | 0 | 0 | 1.547 | 49.050 | 95.371 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 | -472 | -472 | -4.070 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **3.000.457** | **36** | **5.275** | **8.419** | **3.014.187** | **2.965.608** |
| | | | | | | |
| Av- og niðurskriving primo | -1.351.227 | -13 | -873 | -6.015 | -1.358.130 | -1.279.034 |
| Javning av- og niðurskriving primo | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 21.112 |
| Avskrivingar í árinum | -108.611 | -1 | -137 | -583 | -109.331 | -104.278 |
| Afturførdar avskrivingar | 0 | 0 | 0 | 472 | 472 | 4.070 |
| **Av- og niðurskriving ultimo** | **-1.459.838** | **-14** | **-1.010** | **-6.127** | **-1.466.989** | **-1.358.130** |
| | | | | | | |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **1.540.619** | **22** | **4.264** | **2.292** | **1.547.198** | **1.607.478** |
| | | | | | | |
| Roknskaparligt virði ultimo 2021 | 1.601.727 | 23 | 4.401 | 1.328 | 1.607.478 | |
| | | | | | | |
| **Arbeiði í gerð** | | | | | | |
| Arbeiði í gerð primo | 71.213 | 0 | 4.731 | 1.898 | 77.842 | 109.161 |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 65.626 | 0 | 0 | 1.213 | 66.838 | 60.661 |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -46.259 | 0 | 0 | 0 | -46.259 | -91.979 |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **90.580** | **0** | **4.731** | **3.111** | **98.421** | **77.842** |
| | | | | | | |
| Arbeiði í gerð ultimo 2021 | 71.213 | 0 | 4.731 | 1.898 | 77.842 | |
| | | | | | | |
| **Støðisogn ultimo** | **1.450.039** | **22** | **8.995** | **5.403** | **1.645.619** | **1.685.320** |
| | | | | | | |
| Støðisogn ultimo 2021 | 1.530.513 | 23 | 9.132 | 3.226 | 1.685.320 | |

# Notur 8–10

## 8. EGINOGN

| Upphæddir í t. DKK | Partapeningur | Grunnur til avleidd fíggjaramboð | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Eginognaruppgerð 01.01.21 - 31.12.21 | | | | |
| Salda 01.01.21 | 0 | -2.147 | 811.454 | 809.307 |
| Javning flutt úrslit undanfarin ár | 0 | 0 | -5.066 | -5.066 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | 2.597 | 0 | 2.597 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** | **34.960** | **34.960** |
| **Salda 31.12.21** | **0** | **450** | **841.349** | **841.798** |
| | | | | |
| Eginognaruppgerð 01.01.22 - 31.12.22 | | | | |
| Salda 01.01.22 | 0 | 450 | 841.349 | 841.798 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | 10.469 | 0 | 10.469 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** | **9.673** | **9.673** |
| **Salda 31.12.22** | **0** | **10.918** | **851.021** | **861.940** |

## 9. SKYLDUR

| Upphæddir í t. DKK | Avdráttur fyrsta árið | Restskuld eftir 5 ár | Skuld tilsamans 31.12.22 | Skuld tilsamans 31.12.21 |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 161.133 | 419.194 | 937.074 | 782.105 |
| Langfreistað skuld hjá dótturfeløgum | 9.207 | 7.034 | 51.991 | 54.834 |
| **Tilsamans** | **170.340** | **426.228** | **989.066** | **836.939** |

Í 2023 fella 161 mió. kr. til gjaldingar av lániavtaluni frá 2016. Lániavtalan frá 2016 fellur til gjaldingar innan miðal 3,3 ár.
Í lániavtaluni frá 2022 er eingin avdráttur er fyrsta árið, og henda lániavtala fellur til gjaldingar innan í miðal 9,3 ár. Samanumtikið fella lániavtalurnar til gjaldingar innan miðal 6,1 ár.

Fyri langfreistað skuld hjá dótturfeløgum er avdrátturin roknaður sum eitt annuitetslán yvir ávíkavist 10 og 12 ár frá 2016.

## 10. FRAMLEIÐSLUÚRSLIT Á VERK

| Upphæddir í t. DKK | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Skattur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sundsverkið | 297.517 | -182.845 | -18.852 | -26.047 | -51.434 | -4.721 | 0 | 13.619 |
| Vágsverkið | 49.408 | -27.815 | -3.556 | -6.656 | -10.024 | -2.011 | 0 | -654 |
| Fossáverkið | 7.962 | 0 | -1.478 | -808 | -3.452 | -4 | 0 | 2.220 |
| Heygaverkið | 3.102 | -20 | -921 | -400 | -1.183 | 5 | 0 | 583 |
| Mýruverkið | 4.028 | 0 | -550 | -460 | -1.461 | 0 | 0 | 1.557 |
| Eiðisverkið | 36.730 | -5 | -3.032 | -2.240 | -20.006 | -5.136 | 0 | 6.312 |
| Verkið í Botni | -3.661 | 0 | -290 | -134 | -764 | 0 | 0 | -4.849 |
| Verkið á Strond | 12.433 | -9.719 | -939 | -234 | -2.074 | -1 | 0 | -534 |
| Vindorka | 27.215 | 0 | -6.132 | -10 | -16.124 | -2.835 | -652 | 1.462 |
| Smáverk | -968 | -3.923 | -739 | -1.601 | -2.810 | -2 | 0 | -10.043 |
| **Framleiðsluúrslit** | **433.768** | **-224.327** | **-36.490** | **-38.590** | **-109.331** | **-14.705** | **-652** | **9.673** |

# Nota 11

**11. MASKINYVIRLIT VIÐ ÁRSLOK 2022**

| Stað | Maskina | MW | Maskinslag | Framleiðari | Drívevni | Ár | Aldur | Tímar tils. | Tímar 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Botnur | T1 | 1,0 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 58 | 214.342 | 3.259 |
| Botnur | T2 | 2,0 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 57 | 175.085 | 4.506 |
| Eiðisverkið | T1 | 7,0 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 36 | 124.337 | 3.633 |
| Eiðisverkið | T2 | 7,0 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 36 | 127.727 | 4.571 |
| Eiðisverkið | T3 | 7,7 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 2012 | 11 | 63.740 | 7.201 |
| Húsahagi * | V1-V13 | 11,7 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2014 | 9 | 789.922 | 92.090 |
| Neshagi * | V1-V5 | 4,5 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2012 | 11 | 395.054 | 29.648 |
| Neshagi † | V6 | 0,15 | Vindmylla ( fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 30 | 132.549 | 0 |
| Porkeri * | V1-V7 | 6,3 | Vindmylla (pitch reg.) | Enercon | Vindur | 2021 | 0 | 98.412 | 54.945 |
| Skopunarverkið | M1-M3 | 1,83 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | 39 | | 0 |
| Smáverk | | 1,7 | 4-T | Deutz, Mercedes, Perkins | Gassolja | | | | 0 |
| Strond | M3 | 3,6 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 41 | 51.566 | 106 |
| Strond | T1 | 1,4 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 25 | 81.531 | 3.604 |
| Sundsverkið | M1 | 7,85 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2001 | 22 | 84.139 | 1.241 |
| Sundsverkið | M2 | 7,85 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 19 | 78.318 | 2.316 |
| Sundsverkið | M3A | 2,4 | | MTU | Gassolja | 2015 | 8 | 4.432 | 48 |
| Sundsverkið | M3B | 2,4 | | MTU | Gassolja | 2015 | 8 | 4.299 | 18 |
| Sundsverkið | M4 | 12,4 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1983 | 40 | 204.963 | 1.092 |
| Sundsverkið | M5 | 12,4 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1988 | 35 | 186.590 | 3.913 |
| Sundsverkið | M6 | 9,25 | 9L 51/60 | MAN | Tungolja | 2020 | 3 | 15.558 | 6.459 |
| Sundsverkið | M7 | 9,25 | 9L 51/60 | MAN | Tungolja | 2020 | 3 | 13.648 | 3.210 |
| Sundsverkið | M8 | 9,25 | 9L 51/60 | MAN | Tungolja | 2020 | 3 | 17.590 | 5.759 |
| Sundsverkið | M9 | 9,25 | 9L 51/60 | MAN | Tungolja | 2020 | 3 | 17.536 | 5.916 |
| Sundsverkið | B4-C2 | 8,8 | KTA50G3 | Cummins Diesel | Gassolja | 2019 | 4 | 3.809 | 0 |
| Vágsverkið | M1 | 2,7 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 40 | 126.614 | 1.080 |
| Vágsverkið | M2 | 2,7 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 40 | 125.888 | 1.826 |
| Vágsverkið | M3 | 4,2 | 4-T 9M32C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 19 | 107.233 | 4.426 |
| Vágsverkið | M4 | 4,0 | 4-T 9L32 | Wartsila | Tungolja | 2016 | 7 | 33.176 | 2.847 |
| Sumba | G1 | 0,261 | Sólpanel | Solar Polaris | Sól | 2019 | 4 | 347 | 0 |
| Strond agg. | M4-M6 | 3,0 | 4- T C1250 D2R | Cummins Diesel | Gassolja | 2014 | 9 | 19.185 | 8.468 |
| Vestmanna | Fossá 1 | 2,1 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 70 | 240.645 | 5.128 |
| Vestmanna | Fossá 2 | 4,2 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 67 | 383.205 | 6.679 |
| Vestmanna | Heygav. 1 | 4,9 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 60 | 256.400 | 5.086 |
| Vestmanna | Mýruv. 1 | 2,4 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 62 | 414.589 | 7.623 |

* Sí roknskapirnar hjá P/F Vindfelagið í Húsahaga og P/F Vindfelagið í Neshaga fyri framleiðslutímar fyri hvørja myllu.

† Hendan vindmyllan fórst av snarljósi 9. november 2021 og verður ikki gjørd aftur.

# Notur 12–14

**12. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR**

Víst verður til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV, har veðsetingar og aðrar møguligar skyldur framganga.

**13. REGULERINGAR**

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Avskrivingar | 109.331 | 104.278 |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaði | 14.705 | 19.903 |
| Skattur | 652 | -405 |
| **Tilsamans** | **124.689** | **123.776** |

**14. ÚTGREINING STØÐISOGN FRAMLEIÐSLUVIRKIR**

| Upphæddir í t. DKK | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Maskindeild felags | 2.643 | 1.935 |
| Fossáverkið | 20.231 | 23.192 |
| Heygaverkið | 16.746 | 17.737 |
| Mýruverkið | 11.766 | 13.136 |
| Eiðisverkið | 401.127 | 420.819 |
| Verkið í Botni | 10.109 | 10.459 |
| Vágsverkið | 117.183 | 123.061 |
| Verkið á Tvøroyri | 0 | 0 |
| Sundsverkið | 811.660 | 829.400 |
| Skopun | 31 | 35 |
| Verkið á Strond | 18.596 | 17.377 |
| Vindorkutøkni | 128.906 | 143.486 |
| Smáverk | 454 | 152 |
| Mobilaggregat | 0 | 189 |
| Fugloy | 1.545 | 1.600 |
| Svínoy | 66 | 72 |
| Mykines | 1.396 | 704 |
| Hestur | 2.121 | 2.224 |
| Koltur | 961 | 283 |
| Nólsoy | 61 | 64 |
| Skúvoy | 482 | 476 |
| Dímun | 1.111 | 1.076 |
| **Framleiðsluvirkir tilsamans** | **1.547.198** | **1.607.478** |

www.sansir.fo

**SEV**
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538